# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Judith Nielsen áttati



8. november fyllir Judith Lilholm Nielsen búsitandi í Keypmannahavn 80 ár.

Judith Hansen, sum er upprunanavn hennara, er ein av døtrunum hjá Annu og Tummas í Leynum, tey, sum settu búgv í Múlheiðum. Anna, dóttur Elsu og Jens á Trøðni - og Tummas var sonur Annu og Mikkjal, bóndafólkini á Uppistovugarðinum í Leynum.

Barnaflokkurin í Múlheiðum taldi 15, og tey komu øll væl undan. Í 1944 mistu tey pápan. Tummas slerdi út av trolaranum »Skálaberg« á fiskiveiðu. Í 1952 doyði Anna.

Judith var fjórða í røðini av systkinaflokkinum í Múlheiðum. 9 mánaðar gomul var hon, tá hon kom til Havnar í 1925 at vera hjá Biritu og Edvard Lindenskov í Rættará, foreldrum okkara. Tummas í Leynum og móðir vóru systkinabørn.

Barnaárini gekk Judith í skúla hjá Amaliu Joensen, Christines Minde (Bauers hús) í Rættará, síðan í realskúla og eftir lokið prógv beint fyri kríggið í 1939 var at finna sær arbeiði, tí hóast evnini til víðari lestur vóru hildin at vera har, varð einki gjørt við tað, tí hóttandi heimsstríð stóð fyri durum, og tað læsti fyri so mangari ætlan hjá teim ungu.

Judith fer á Telefonstøðina sum boðgenta, m. a. at bera boð niðan á Telegrafstøðina, álitisstarv var hetta, nú kríggj var, og alt sum bar á brá av militeri var undir strongum eftirliti. Síðan hjá Kaaber, tannlækna og fer so á sakføraravirkið hjá Husted Andersen, landsrættarsakførara. Her var hon øll árini, til Husted Andersen flutti av landinum í 1950, men Judith helt fram í sakføraravirkinum, sum nú gekk undir navninum Per Kehler og Leivur Lützen, landsrættarsakførarar.

Í 1953 fluttu Judith og Henning Lilhom Nielsen av landinum, tey giftust í 1949, hann kom til Føroya sum slaktarameistari í Smæruni í 1947. Henning stovnaði slaktarabúð í Keypmannahavn - og slaktarin á Jydeholmen í Vanløse hevur framvegis gott navn á sær. Nú rekur sonurin Bent handilin, har 10 fólk starvast.

Henning doyði í apríl 1993, 70 ára gamal, sjálv var hon tá givin á sakføraravirkinum Oppenheim & Prangen, men longu tá var farið at bila við heilsuni, og Judith hevur seinni árini búð á røktarheimi í Brøndshøj.

Judith var eisini skrivari hjá próstinum, reinskrivaði tekstir til føroysku sálmabókina og bókina Víkingasynir.

Hon skrivaði lógartekstir, har Husted Andersen var juridiski kunnleikin, hann var sum oftast juridiskur ráðgevi hjá Petur Mohr Dam, t. d. tá hann legði málið fram um stýrisskipan Føroya undir krígnum, lógartekstir til viðtøkur til tryggingarfeløgini, sum løgtingið stovnsetti, har Husted Andersen somuleiðis var juriski ráðgevin. Og Judith var nærlagdi og miðvísi tekstskrivarin.

Judith var livandi og virkin, nærløgd, hon gloymdi ongan, hevði gott samband við øll síni, og eingin serligur dagur fór framvið, at hon ikki mintist. Tí kennist tómleikin nú hon ikki ringir sunnumorgnar, sum vanligt var tey mongu árini - og mongu løturnar heima hjá teimum í Vanløse, vekja sorgblíð minni.

80 ára dagurin verður hildin í Brøndshøj sunnudagin 7. november. Sunnvá verður har, Bent, sonurin og familja, og treyðugt so at ikki onkur støkkur inn á gólvið.

Vit vitjaðu fyri stuttum og kundu fegnast um, at hon kennir okkum, fríða bros hennara boðar frá tí, hóast hon ikki fær sagt stórt meir enn einstøk orð, so váttar brosið, at hon fatar og nemur.

Adressan er: Judith Lilhom Nielsen, Pilehuset 25, Bystævneparken, 2700 Brøndshøj.

## Sámal Christiansen 75 ár



Góði pápi, verpápi og abbi

Tíðin gongur alt ov skjótt. Tað ræður um at fáa sum mest burturúr. Hetta verður ofta sagt, tá hugsað verður um lívið og gerandisdagin. Og spurt verður ofta, hvussu ein skal fáa dagin at ganga ?

Hesir spurningar hava ongantíð volda tær trupulleikar, tí tú hevur higartil havt eitt sera innihaldsríkt lív, hevur sett tíni fingramerki í bygdini og hevur eitt sera gott bakland í mammu. Seinastu árini hevur tú sjálvur sett dagsskránna, og hon hevur ikki verið keðilig. Tónleikur, abbabørn, seyðir, eplir, rabarbur, bátur og onnur evnið hava mynda gerðandisdagin. Ein góður og trúgvur vinarskarði er eisini týdningarmikil depil í tykkara lívi.

*Lívið gott tit hava liva,*
*vakin, virkin og so góð,*
*fyrimynd vit skulu skriva,*
*heilsu bera vit nú fró.*

Vit ynskja tær tillukku við degnum og ynskja, at tit bæði fáa nógv góð ár afturat.

**Frá okkum í Yemen, Sæby, Minnisota, Egå og Tórshavn.**

## Sjey systkin savnað um beiggjan



*Átta systkin avmyndað saman fyri fyrstu ferð nakrantíð: Frá vinstru: Jákup Matras Olsen, Trongisvágur, Jastrid Dragsten, Keypmannahavn, Maria Eliasson, Keypmannahavn, Poul Olsen, Rødbyhavn, Óli Jákup Olsen, Trongisvágur, Cederfelt Olsen, Tvøroyri, Solveig Lowe, Darlington, England og Tórolvur Mohr Olsen, Sandur*
*Privatmynd*

**Tá Poul Olsen, sum er yngstur av átta systkjum, herfyri fylti seksti ár, fóru øll systkini í føðingardag. Tað er í sjálvum sær kanska ikki so óvanligt, men í sambandi við runda dagin, varð ein mynd tikin av teimum, og er tað fyrsta myndin, sum nakrantíð er tikin av øllum átta undir einum taki**

FØÐINGARDAGUR

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Poul Olsen og hansara sjey systkin vórðu øll fødd í Trongisvági. Tað eru 18 ár millum Poul og elstu systur hansara. Poul varð føddur við Down Syndrom, so hann varð sendur niður á Rødbygård sum sjey ára gamal.

Har hevur hann búleikast líka síðani, og hevur hann fingið eitt gott lív. Hann er væl fyri og býr fyri seg sjálvan.

Ein av beiggjunum hjá Poul, Tórolvur Mohr Olsen, greiðir frá, at tað ongantíð var nakar ivi um, at tey øll skuldu fara niður at vitja bróðurin.

— Vit komu úr ymiskum heraðshornum at vitja Poul á stóra degnum. Hann var sjálvandi øgiliga fegin um at fáa øll systkini á vitjan upp á ein gang, greiðir Tórolvur frá.

Poul hevur ofta verið heima í feriu, men hetta var fyrstu ferð, at øll sjey systkini komu á vitjan í senn.

Tað sum kanska eisini kann sigast at vera nakað undrunarvert er, at tey systkini, hóast nøkur eru farin væl upp um sjeyti ár, eru stak væl fyri. Tískil var tað ongin trupulleiki hjá nøkrum av teimum at ferðast til Rødbyhavn.

Tórolvur sigur, at myndin hevur ótrúliga stóran týdning fyri hann.

— Hetta er tann fyrsta myndin av okkum øllum, sum er tikin, meðan vit øll eru undir saman taki. Eg eigi eina aðra systkinamynd, men har er tað eina sett inn í myndina aftaná, greiðir hann frá.

Øll systkini búðu á einum hotelli, har føðingardagurin eisini varð hildin. Tey ótu ein góðan bita og hugnaðu sær saman. Tað var ójavnt, hvussu longi tey steðgaðu í Danmark, men øll vóru tey savnað til sjálvan føðingardagin, sum var tann 20. september.

### 75 ára føðingardagur

Í dag, 5. november, verður Sámal Christiansen, Klaksvík, vanliga nevndur Sámal hjá Barbu, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við familju í Havn.

### Dagurin

**5. november. Malakias**, deyður ár 1148. Írskur munkur, sum varð valdur til biskup í Armagh í Írlandi. Segðist at útinna mong undurverkini. Summir halda, at sipað verður til *Málaki*, tann síðsta av teimum 12 smáu profetunum í Gamla testamenti.

Bíbilska profetanavnið merkir *mítt sendiboð*.




# LANGUR LEYGARDAGUR




# 6. NOVEMBER 2004